føroya fólkaháskúli

Vetrarskeiðið byrjar 5. September

Við tí økta og fjølbroytta úrvali av lærugreinum — bæði fyri tey, ið eru á byrjanarstigi og tey, ið vilja læra meira, kunnu vit bjóða øllum eitt læruríkt og minniligt skeið.

Á byrjanar- og framhaldsstigi:

Rokning
matematikk
danskt
føroyskt
enskt
týskt

handarbeiði, veving, evning, list, sjónleikur, filmur, bókmentir, fimleikur, ítrótt, havfrøði, fiskivinna, samfelagsfrøði, søga, kunning, fyrilestrar um ymisk evni.

Høvi er at fyrireika seg til HF-skeið.

Ung hitta onnur ung í skúlaarbeiði, í gaman og álvara og á útferðum — og fáa rík minni fyri lívið.

Ringið ella skrivið til háskúlan, so fáa tit nærri at vita. *Tlf. 11743*

Stjórnin

Útbjóðing

Vegna Útvarp Føroya hevur arbeiðið við bygging av nýggjum útvarpshúsum við hesum boðið út í almennari lisitatión. Entreprisurnar verða hesar:

1. Jørð-, kloakk- og betongarbeiðið.
2. Tekningararbeiðið.
3. Múraraarbeiðið.
4. Timburarbeiðið.
5. Snikkaraarbeiðið.
6. Málaraarbeiðið.
7. Gólvåleggingararbeiðið.
8. Hitaverks- og sanitetsarbeiðið.
9. Ventilatiónsarbeiðið.
10. Elinnleggingararbeiðið.

Skrivlig bílegging av útbjóðingartilfarinum verður send til J. P. Gregoriussen, arkitekt, Heygsvegur 27, 3800 Tórshavn í seinasta lagi 2. juli 1977. Sum veðhald fyri útbjóðingartilfarið, verður saman við bíleggingarbrævinum sendur krossaður kjekkur, stórur kr. 1.500,— skrivaður til Útvarp Føroya. Útbjóðingartilfarið verður síðani sent teimum bjóðandi.

Lisitatiónin verður mánadagin 29. august 1977 kl. 16.00 á teknistovuni, Heygsvegur 27, 3800 Tórshavn.

Tórshavn, 20. juni 1977

J. P. Gregoriussen, arkitektur m.a.a.



— eg havi lisið tað í **sosialinum** *sjálvandi!!*

FØROYA HANDILSSKÚLI

3800 Tórshavn . Tinghúsvegur 5

- skúlin fyri ung og tilkomin

UNDIRVÍSINGARSKRÁ 1977/78

Undirvísingin fæst í hesum deildum

Felags upptøkutreytir:

Í minsta lagi prógv úr 9. flokki, ella skal næmingurin verða fyltur 16 ár ádrenn 1. februar í skúlaárinum.

Handilsmedhjálparaprógv (2 ár):

Byrjar 22/8 og endar umleið 5/4. Undirvíst verður 4 kvøld um vikuna, 10-14 tímar samanlagt.

1. Skrivstovulinjan

Fyri tey, sum ætla sær í ella hava skrivstovuyrki. Lærugreinir: Bókhald, rokning, enskt II ella III, maskinskriving, vinnulív og samfelag, edv og serligt skeið í skrivstovuteknikki.

2. Heilsølulinjan

Fyri tey, sum hava læruplass í heilsølum. Lærugreinir: Tær somu sum fyri skrivstovunæmingar. Tó verður serstakt yrkisskeið nidri í staðin fyri skrivstovuteknikk.

3. Smásølulinjan

Fyri tey, sum hava læruplass í krambúdum. Lærugreinir: Bókhald, rokning, enskt II ella III, handilslæra, sølulæra, skeltskriving og 1 ella 2 serlig yrkisskeið nidri.

Prógv kann eisini takast í hvørjari lærugrein sær.

Fakroyndir (1 ár):

Fyri tey, sum hava hug at taka prógv í einstøkum ríkisgódkendum lærugreinum. Undirvísingin byrjar 22/8 og endar umleið 5/4. Undirvíst verður 2 kvøld um vikuna í hvørjari lærugrein.

Hægri fakroyndir (1 ár):

Undirvísingin byrjar 29/8 og endar umleið 20/5. Undirvíst verður 2 x 2 tímar um vikuna.

Merkonomskeið (1 ár):

Undirvísing á hægri stigi fyri meira tilkomnum, t.v.s. 18 ár og eldri. Undirvísingin byrjar 29/8 og endar umleið 5/5. Undirvíst verður 1 kvøld á 2 tímar um vikuna í hvørjari lærugrein.

Bankaskúli (framhald):

	Tórshavn	Klaksvík	Fuglafjørður	Tvøroyri	Vágur	Sørvágur	Sandur	Oyrarbakki
Innskriving: 4/8 - 10/8								
	×	×	×					
	×	×	×					
tlf.	13374	55087	44106	71181	71181	209	115	22084
	×							
	Bókjarabrekka 9	Páll á Dul, Heygavegur	Arnold Abrahamsen	Johs. Enni	Johs. Enni	Tóri Skaalum	J. Birgir Mohr	Felagsskúlin
Bókhald	×	×	×	×	×	×	×	×
Rokning	×	×	×					
Enskt II	×	×	×	×	×	×	×	×
Enskt III	×	×	×	×	×	×		
Týskt II	×							
Maskinskriving I	×	×	×	×	×	×	×	×
Maskinskriving II	×	×	×			×		
Matematikk (byrjanarstig)	×							
Føroyskt v/handilsbrævskriving (nýtt!)				×	×			
Roknskaparlæra (fortreyt: bókhald)	×	×	×					
Enskt IV (fortreyt: enskt III)			×					
Virkisøkonomi	×							
Organisatión	×							
Starvsfólkaleidsla	×	×	×					
Datavidgerð I	×							
Datavidgerð II	×							
Tjódarøkonomi (nýtt!)	×							
Innkeyp (nýtt!)	×							
Føroyskur skattarættur	×							
Roknskaparlæra	×							
Samfelagsøkonomi	×							

Gjøllari verður lýst um ólavssøkuleitid.

Næmingar, sum eru burturstaddir í innskrivingardøgunum, verða bidnir um at senda deildini upplýsingar um: navn, bústað, tlf.nr., fødingardag, fakynski og avrit av loknum prógvum.

Næmingagjaldið er dottið burtur (við undantak av merkonomskeiðum). Tó verða 100 kr. latnar í fyrisitingargjaldi.

Skúlin veitir 15 oyru/km í studningi fyri koyring millum bygdir.

Handilsmedhjálparanæmingar fáa lærubøkur ókeypis.

Týskt og matematikk er neydugt at hava hjá teimum, sum ætla sær at ganga á 2 ára dagskúla til hægri handilsprógvtøku, sum ætlanin er at fara undir í 1978.

Í juli mánað kann ikki roknast við, at leiðsla skúlans er at hitta.